
NORÐOYA SPARIKASSI
#hús #íbúð #bilur
TOSA VIÐ OKKUM UM FÍGGING
• HEIMLÁN
• BÚSTAÐARLÁN
• REALKREDITTLÁN
• BYGGIKREDITTUR
• NÝTSLULÁN
• BILLÁN

# Bústaðarfígging

HEILDARFÍGGING
Vit ynskja at veita tær eina heildarfígging, sum er lagað tær, eins og miðað verður eftir, at tú fært avgreitt øll fíggjarligu ørindi tíni á einum staði. Vit hava hesar lánimøguleikar at bjóða tær:

- HEIMLÁN
- BÚSTAÐARLÁN
- REALKREDITTLÁN
- BYGGIKREDITTUR
- NÝTSLULÁN
- BILLÁN

## Droymir tú um egið heim?

HEIMLÁN
Heimlán er eitt øðrvísi og spennandi tilboð til øll, sum hava, ella ætla at útvega sær, egin hús ella íbúð.

FYRIMUNIR
Heimlán er sett saman av einum 1. og einum 2. veðrættarláni, og tú rindar eitt lánsgjald, soleiðis at dýrari parturin verður goldin fyrst.

Fært tú óvæntaðar útreiðslur, kanst tú fáa “time out”. Tú fært møguleika fyri 36 klippum, har hvørt klippið svarar til gjaldskáa í ein mánað.

Rentustuðulin verður fluttur beinleiðis inn á lánið.

# Bústaðarfígging

Droymir tú um egið heim?

### UM HEIMLÁN

Við vanligari bústaðarlánsfígging økist nettogjaldið, so hvørt sum rentustuðulin minkar. Við Heimláninum er hædd tikin fyri hesum, soleiðis at tú rindar sama nettogjaldið, heilt til lánið er útgoldið.

Heimlán verða vanliga latin yvir 20 ella 25 ár.

### PRÍSIR OG TREYTIR

Tá eitt Heimlán verður stovnað, eru ymiskir kostnaðir, ein skal hugsa um, eitt nú stovningarprovisión, avgreiðslugjald, gjald til tinglýsing og veðhavaralýsing.

Rentan verður ásett við at taka støði í heildarmyndini av fíggjarviðurskiftum tínum. Rentan verður tilskrivað kvartárliga og er broytilig.

Renta og kostnaðir eru at finna á heimasíðuni www.ns.fo.

Sparikassin tekur veð í ognini sum trygd fyri láninum.

### BÚSTAÐARLÁN

Her er talan um annuitetslán og serialán. Við annuitetsláni er lánsgjaldið tað sama, heilt til lánið er útgoldið. Fyrstu tíðina er rentuparturin størri enn avdrátturin, men sum frá líður gerst býtið øvugt, rentuparturin verður minni og avdrátturin størri. Sostatt er rentustuðulin lutfalsliga hægri fyrstu tíðina.

Við serialáni eru avdráttirnir eins stórir, heilt til lánið er útgoldið, meðan rentan, og sostatt samlaða lánsgjaldið, sum frá líður gerst minni.

# Bústaðarfígging

## REALKREDITTLÁN

Vit bjóða lán við fastari rentu alt lánitíðarskeiðið og lán, har rentan verður tillagað við 1-5-ára millumbilum.

Í mun til Heimlán er Realkredittlán grundað á lánsbrøv, har útboð og eftirspurningur á fíggjarmarknaðinum avger kostnaðin á láninum. Eitt lánsbræv er eitt skuldarbræv, har avtala verður gjørd um, hvussu skuldin skal gjaldast aftur og undir hvørjum treytum.

Tá tú fíggjar bústað tín við einum Realkredittláni, selur realkredittstovnurin lánsbrøv tína vegna á fíggjarmarknaðinum. Peningurin, sum kemur inn umvegis søluna, eftir mótrokning av ymiskum kostnaðum, móttekur tú sum lán.

Tað eru nógv ymisk Realkredittlán, men hesi kunnu í høvuðsheitum savnast í tvey, t.e. lán við fastari rentu og lán við skiftandi rentu. Hóast lánini eru ymisk, eru tey bæði grundað á lánsbrøv.

Norðoya Sparikassi hevur samstarvsavtalu við DLR Kredit í Danmark um at bjóða realkredittfígging til føroyskar bústaðir.



## BYGGIKREDITTUR

Tá farið verður undir at byggja, er umráðandi at hava fíggingina tøka. So hvørt sum bygt verður, verður hetta fíggjað við byggiláni, og tá byggingin er liðug, verður byggilánið umlagt til endaligu fíggingina.




# Nýtslulán

## NÝTSLULÁN
Hevur tú bráðneyðugan fíggjartørv, ella ynskir at samla tína smáskuld í eitt lán, kann nýtslulán vera loysnin.

## FYRIMUNIR
Um júst títt dreymainnbúgv er sett niður í hálvan prís, ella um tín telda er fyrigingin, so hevur tú við einum nýtsluláni møguleika at keypa hetta her og nú.

Tú kanst samla alla tína smáskuld í eitt lán, og fáa betri yvirlit yvir fíggjarviðurskiftini.

## UM NÝTSLULÁN
Afturgjaldstíðin á einum nýtsluláni er vanliga stutt, alt eftir støddina á láninum. Áramálið kann vera upp til 5 ár. Tú kanst brúka eitt nýtslulán til tað, sum tú hevur brúk fyri.

## RENTA OG TREYTIR
Rentan sæst í rentuyvirlitinum á heimasíðu okkara www.ns.fo.

Fyri at fáa eitt nýtslulán skalt tú verða fylt/ur 18 ár, og annars hava góð fíggjarviðurskifti.

# Billán

## BILLÁN

Tað kann verða ein góð fíggjarlig avgerð at skifta bilin út, áðrenn bilurin nær tann aldurin, tá hann krevur ábøtur. Ein nýggjur bilur er meira tryggur, álítandi og umhvørvisvinarligur.

## FYRIMUNIR

Við einum billáni kanst tú fíggja keyp av nýggjum bili, brúktum bili ella húsvogni. Keypir tú ein nýggjan bil, kann áramálið á láninum verða upp til 7 ár.

## FAKTA

Tað eru nógvar útreiðslur við at keypa og eiga ein bil. Áðrenn vit bjóða tær eitt billán, hyggja vit at tínum fíggjarviðurskiftum, og kunnu tá finna útav, hvussu nógv tú kanst lána og gjalda um mánaðin.

## RENTA OG TREYTIR

Rentan verður ásett í mun til útgjaldið á bilinum, sí annars rentuyvirlit á www.ns.fo

Vanliga verður tú biðin um at seta bilin sum trygd fyri lánið.

Fyri at fáa billán skalt tú verða 18 ár, og tíni fíggjarviðurskifti skulu vera góð.



*Møguleikarnir eru ymiskir. Miðað verður eftir at tú fært avgreitt øll fíggjarligu viðurskifti tíni á einum staði. Ynskir tú at vita meira um bústaðar- og bilfígging, ert tú altíð vælkomin at tosa við okkum.*

*Ring á tel. 475000 ella skriva til okkum á ns@ns.fo.*

Bílegg eitt fíggjarprát á tel. 475000

ns.fo | 475000 | ns@ns.fo | ns.fo | Norðoya Sparikassi | Norðoya Sparikassi

NORÐOYA SPARIKASSI

**Klaksvík**
Ósávegur 1
FO-700 Klaksvík
Tel 47 5000
Fax 47 6000

**Fuglafjørður**
í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel 47 5000

**Tórshavn**
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel 47 5000
Fax 47 6015

**Upplatingartíðir**
Mán. - frí. kl. 9.30 - 16.00
tó hósdag kl. 9.30 - 18.00

*Fyrivarni verður tikið fyri villum og broytingum. Dagført til og við 26. apríl 2017.*

GRAFIA

ns.fo